

## SKRIVARI OG DAGLIGUR SAMSKIPARI

Spennandi og avbjóðandi starv sum skrivari og dagligur samskipari í LISA – Listafólkasambandi Føroya.

Søkt verður eftir fólki, til at hava um hond dagliga virksemið í LISA, at byrja skjótast til ber. Starvið er 30 tímar um vikuna og er treytað av játtan frá Mentamálaráðnum. Løn sambært avvarðandi yrkisfelag.

**VIRKSEMIÐ FEVNIR UM:**

- At leggja til rættis virksemið hjá LISA.
- At skráseta viðurskiftini hjá teimum 9 limafeløgunum.
- At leggja til rættis fundir.
- At fylgja øllum málum sum starvsnevndin og umboðsráðið hava samtykt.

**FØRLEIKAKRØV:**

Tann, ið søkir:

- Skal vera køn/ur í føroyskum, øðrum norðurlendskum málum og enskum.
- Skal hava teldukoyrikort.
- Skal hava kunnleika um at skriva umsóknir.
- Skal hava førleika at halda roknskap.

Umsóknir skulu sendast til LISA, postsmoga 324, FO-110 Tórshavn, og vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. apríl 2006.

REPROZ

LISA



# Húsavørður

Hotel Føroyar søkir eftir húsavørði at byrja skjótast tilber.

**Starvið**

Talan er um eitt sjálvstøðugt starv, við tilvísing til verandi húsavørð. Starvið umfatar alt dagligt viðlíkahald á hotellinum innan- og uttandura, tænastuuppgávur í smb. við tiltøk, innkeyp umframt aðrar viðkomandi uppgávur.

**Umsøkjarin**

Dentur verður lagdur á at viðkomandi er sjálvstøðugur, álítandi og sera raskur. Royndir og/ella útbúgving innan tøkni, vvs ella líknandi er ein fyrimunur.

**Vit bjóða**

Vit bjóða eina støðuga inntøku, eitt fjølbroytt starv við nógvum avbjóðingum.

Umsóknir skulu sendast til:

Hotel Føroyar P/F,
Postsmoga 3303,
110 Tórshavn

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 7. apríl 2006.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Agnar Joensen, húsavørður, á 31 75 00.

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*


# MOBALPA

*- franskir dygdarkøkar við 25 ára garanti*



á Hjalla - 188 Hoyvík
Tlf 315415 - Fax 319001
Rúni Lómstein freelance seljari tlf 505959

damor


## TEKNISKUR SØLURÁÐGEVI

Til teknisku deild okkara verður søkt eftir søluráðgeva




Royndir okkara tey seinastu 60 árini, hava gjørt okkum til ein tann størsta HVS heildarveitara í Føroyum. Vit bjó a fram heildarloysnir innan hitaverk, vatn, sanitet, ventilatión, kloakk og ba irúmsmøblar

**Tað setur krøv til starvsfólkið**

Tú kemur at ráðgeva kundum okkara og hjálpa teimum at finna tað røttu loysnina. Tú kemur at rokna út tilboð, og verða við til at fyrireika størri verkætlanir og fylgja teimum í verki.

Samstundis fært tú ábyrgd og ávirkan á at menna fyritøkuna. Tú kemur soleiðis, í samstarvi við onnur, at virka á einum spennandi og fjøltáttaðum arbeiðsplássi.

**Tað er ein fyrimunur um tú**

- Hevur røttu útbúgving og/ella drúgvar royndir
- Hevur royndir innan vhs, ventilation ella líknandi
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Ert fyrikomandi, nærlagdur, íðin, og kreativur
- Skilur týdningin av at góðum handverki, dygd og góðari kundarøkt

**Afturfyri bjóða vit**

- At tú fært eitt spennandi starv við nógvum møguleikum
- At tú fært góðar samstarvsfelagar í góðum fakligum arbeiðsumhvørvi
- Ávirkan á tín egna arbeiðsdag
- Løn, í samsvarar við tín førleika
- Stutt sagt, eitt spennandi starv í einari fyritøku í støðugari menning

Sosialurin 341800

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tel. 312 000 og tosa við Kristian á Dul, stjóra.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal verða innkomin seinast 7. april til:

**Maria Poulsen pf**

Smyrilsvegur 8 · 100 Tórshavn · Tel 31 20 00 · www.mariapoulsen.fo